Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Djóni Nolsøe Joensen, landsstýrismaður í barna- og útbúgvingarmálum

Evni: Frálærutilfar við støði í føroyskum viðurskiftum

Spurningar:

1. Hvat er málið fyri framleiðslu av frálærutilfari á føroyskum og/ella við støði úr føroyskum viðurskiftum til teirra, sum nema sær handligar og bókligar førleikar eftir fólkaskúlatíðina?
2. Hvussu er støðan í dag hesum viðvíkjandi, og nær væntast, at komið verður á mál?

Viðmerkingar:
Tað er í fleiri førum upplýst, at tey, sum nema sær víðari førleikar bæði innan tað handliga og bókliga hava undrast á, hvussu stórur partur av frálærutilfarinum tekur støði í øðrum samfeløgum enn okkara og ofta er á fremmandum máli.

Samstundis frætta vit, at alsamt meira frálærutilfar verður framleitt og tí betrar um støðuna hjá teimum, sum lesa og læra.

Tí hesir spurningar um mál og støðu á hesum øki.

Á Løgtingi, 23. august 2023

Eirikur í Jákupsstovu